

# Í dag fær Dong 13 mia. krónur

**Jan Müller**

20.02.2014 - 21:45

Oljan.fo

Dong Energy hevur í dag boðað virðisbrævamarknaðinum í Keypmannahavn frá, at eigararnir hava góðkent ta umstríddu kapitalvíðkanina, og at amerikanski íløgubankin Goldman Sachs kemur inn sum ein av eigarunum. Avgerðin varð tikin á eykaaðalfundi í dag.

Saman við donskum minnilutaeigarum hevur Goldman Sachs sett góðar 13 milliardir krónur í danska orkufelagið. Millum hinar íleggjararnar eru ATP og PFA Pension. At umboða seg í nevndini í Dong hevur amerikanski bankin valt týskaran Martin Hintze. Hann er stjóri hjá Goldman Sachs International í London.

Sambært avtaluni eigur amerikanski bankin 19 prosent av Dong Energy. Danski staturin hevur framvegis greiðan meiriluta við 60 proserntum.

**Kom óvast á**

Avgerðin hjá donsku stjórnini at taka av tilboðnum frá Goldman Sachs elvdi til nógv kjak í Danmark og var beinleiðis orsøkin til, at Sosialistiski Fólkaflokkurin fór úr stjórnarsamgonguni, og at Annette Vilhelmsen fór frá sum formaður í SF.

Tað nógva kjakið kom púra óvart á Goldman Sachs, sigur Martin Hintze við Børsen í dag.

-Vit høvdu væntað eitt sindur av politiskum kjaki, men hetta er fyrstu ferð, at vit hava upplivað, at bankin hevur verið orsøkin til, at ein stjórn er sprongd, sigur nýggi nevndarlimurin í Dong Energy.

-Men nú gleða vit okkum til samstarvið og at virðisøkja felagið til frama fyri statin og partaeigararnar, sigur Martin Hintze við Børsen.